eisini fyrsti abba- og ommusonur mínumegin. Tá ið hann skuldi doypast, segði eg mammu, at vit fóru at kalla pápa upp. Henni líkaði tað ikki væl, eg veit ikki hví. Men navnið var eyðgivið. Hann var føddur, ja løgið er tað, tann 26. mars kl. 9,30 á kvøldi, sama dag og sama tíma, sum Ernestine var farin á land 20 ár frammanundan.

Abbin var føddur sunnudag, fyrsti abbasonurin somuleiðis. Sostatt var sjálvsagt, at hann fekk navnið Jóan Magnus Suni.

Í samband við hetta kom eg at hugsa um eina bók í húsinum. Hon æt "Når først væven er standset." Eg veit ikki meira um bókina uttan hetta ørindi, ið ofta varð havt á munni.

*Når først Væven er standset*
*og Skytlen holdt op med at slaa*
*vil Gud tage Tæppet til side*
*og lade os klart forstaa*
*hvorfor de mørke traade*
*saavel som de gyldne baand*
*er lige saa nødvendige for Mønstret*
*i Mesterens kyndige Haand.*

Men enn gongur vevurin og skjúttilin slær. So leingi tað varar, er tað skylda okkara at greina lítla torskilda mosaikk og eisini tann stóra, hann er partur av, so vit gerandis kunnu fáa gagn av tí arvi, hann ber í sær.

Her kann skoytast uppí, at av hesum fýra brøðrum liva tveir í dag. Rólant doyði fyri nøkrum árum síðani, og Hjørleif nú um jóltíðir. Umframt Símun livir sostatt Hjalmar, kendur sum skipari á Barsskor í mong ár. Hjalmar hevur eisini dugnað frásøgnini um Ernestinu, eins og hann hevur dugnað øðrum tilfari, sum eg havi skipað fyri.

## Jóan Magnus bjargaði beininum á mammubeiggjanum

Fyri nøkrum arum síðani hevði FF-blaðið samrøðu við Sverra Rasmussen, ættaður av Skála. Hann var sonur Palla Rasmussen, vanliga nevndur Skála Palli, sum var mammubeiggi Jóan Magnus. Ta ferðina fortaldi Sverri eina heilt ótrúliga søgu um, hvussu Jóan Magnus bjargaði beininum á Palla. Frásøgnin hjá Sverra var henda:

25. mars í 1925 høgdi pápi seg illa í beinið við eini øks, og annar leggurin fer í knús. Eingin lækni var á Skálafjørðinum tá, og sum frá leið kom kolbrandur í. Á sjúkrahúsinum í Havn vóru læknarnir samdir um, at skuldu teir bjarga lívinum á pápa, máttu teir taka beinið. Men tað vildi pápi ikki, og hann segði korta nei. Hann gav greið boð um, at "tit kunnu taka høvdið, men beinið sleppa tit ikki at røra". Men læknarnir søgdu, at "vit hava




*Hetta er partur av manning á Skálanesi. Seks av hesum monnum vóru eisini við Ernestinu*
**1.** *Thomas Thomassen, Miðvágur, var við Ernestinu, beiggi Jógvan sum doyði*
**2.** *Sigmund Brest Thomsen, Skúvoy, var við Ernestinu*
**3.** *Ansgar Jensen, Hellurnar*
**4.** *Johan Medardus Høgnesen, Hellurnar*
**5.** *Ziska Jacobsen, Klaksvík, var við Ernestinu*
**6.** *Eliseus Jacobsen, Syðradalur, var við Ernestinu*
**7.** *ókendur*
**8.** *Frederik Mikkelsen, Skúvoy, var við Ernestinu*
**9.** *Johan Elias Eliassen, Mikladal*
**10.** *Óli Joensen hjá Dáva, Klaksvík*
**11.** *Dia á Grømma*
**12.** *Erik Lassen, Klaksvík, var við Ernestinu*



*Skála Palli og konan Rakul. Jóan Magnus bjargaði beininum á mammubeiggjanum*

skyldu til at bjarga lívi tygara". So her mátti okkurt gerast.

Ein genta av Skála var gongsgenta á hospitalinum. Hon æt Rakul á Fløtti. Pápi bað hana samla tað, hann átti í kuffertið, so hann kundu fara av sjúkrahúsinum so tíðliga á morgni, at eingin varnaðist. Jú, hon so ger, og so fer hann. Hann kundi ganga við stavi. Ein lastbilur tók hann upp og koyrdi hann heim í Vágsbotn. Hann fór so inn á Skála við mjólkarbátinum, sum óivað var "Ruth".

Jóan Magnus, systirsonur pápa, var júst komin av skipi. Hann hevði verið við "Solo", sum nú lá á bedingini á Skála. Teir báðir vóru góðir vinir, og teir vóru nærum vaksnir upp saman. Jóan Magnus sá pápa, tá hann kom í land av postbátinum. Hann sigur við pápa: "Nú stendur sera illa til hjá tær". Jóan Magnus vildi hava pápa umborð á "Solo".

### Tann rama gift

Umborð komnir fara teir aftur í kahúttina. Jóan Magnus hevði eitt serligt hegni at hjálpa teimum, sum kravdu læknahjálp. Pápi sat eina langa tíð umborð, meðan Jóan Magnus læs í eini læknabók. So byrjaði hann at blanda. Táið hann var liðugur, koyrdi hann løgin upp í eina stóru fløsku. Kokkur var umborð, og hann hevði úr at gera at bera heitt vatn aftur í kahúttina. So sigur Jóan Magnus við pápa: "Hetta er tann rama gift. Tað skal ein sterkur lútur til, um tú skal sleppa burtur úr hesum." Jóan Magnus bað hann ganga og ganga so nógv, sum hann yvirhøvur orkaði. Mergurin skuldi nokk orðna seg. Men beinið var so hovið, at mamma mátti tvær ferðir leggja brøkurnar út, so hann kundi sleppa í buksurnar.

So sigur Jóan Magnus, at hann mátti koma niðan við til hús, so hann kundi geva mammu boð um at beina fyri fløskuni, um tað hendi nakað óvanligt. Pápi skuldi taka eina súpuskeið av hesum í fløskuni hvønn dag. Pápi greiddi frá, at so skjótt sum hann hevði tikið hesa skeiðina, tá brendi sveittin út um pannuna. Tað fór niður gjøgnum kroppin, og so fór at renna úr sárinum. Eftir einari viku var hevilsið farið at svinna. Hann mátti framvegis liggja so lítið sum møguligt, og hann mátti ganga alt tað, hann orkaði.

Eg var 9 ár tá, og minnist alt hetta. Eg taldi svullirnar á beininum, og teir vóru 24. Tað minnist eg enn dagin í dag. Og tað kom eitt beinsplintur úr hvørjum svulli. Tá komið varð út í oktober kundi hann fara aftur á skipasmiðjuna og fáa okkurt lætt arbeiði. Hvussu leingi fløskan vardi minnist eg ikki. Lítla jólaaftan kom tað seinasta splintrið út, og tað var heilt niðri við øklaknútin.

### Spældi sær av við tryggingina

Men so gekk tíðin. Tá fekk pápi eitt bræv frá tryggingini, at teir skiltu, at hann hevði liðið órætt av læknunum. Hann svaraði aftur og gav ilt av sær um, at teir sendu slíkar kvakksalvarar til Føroyar, sum ikki kundi klára tað, sum ein skipari kundi. Brævið kom aftur um aftur hjá pápa. Hann fekk onga trygging.

So einaferð kemur pápi út á hospitalið at vitja mammu, sum var innløgd. Tá komu boð um, at læknarnir vildu tosa við hann. Teir vóru púra paff at síggja mannin koma trampandi spillfrískan, men teir vóru framvegis firtnir um brævið, sum hann sendi. Men pápi gav aftur teimum av somu skuffu. Hann trampaði í gólvið og segði, at hann skuldi nokk klára seg uttan teirra trygging!

Annars greiðir Hjalmar hjá Jóan Magnus frá, at hvørja ferð hann hitti Skála Palla, plagdi hann at siga: "Pápi tín átti lívið í mær."

Sverri er deyður fyri nøkrum árum síðani, men tað var heppið at fáa hesa søguna um Jóan Magnus, áðrenn tað var ov seint. Palli bleiv annars yvir 90 ára gamal og arbeiddi nærum til tað seinasta.

Framhald á síðu 18